

*Heldur ikki á Suðuroyar Sjúkrahúsi verður neyðugt við so stórum sparingum, í ár, sum upprunaligað varð fryktað fyri. Men heilt undan uppsagnum slepst tó ikki, sigur Helena Dam á Neystabø*

# 4-5 Fólk sigast upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi

*– Men tær grundleggjandi funktiónirnar verða ikki rørdar, sigur Helena Dam á Neystabø*

Heldur ikki á Suðuroyar Sjúkrahúsi verða sparingarnar so stórar, sum tað upprunaliga varð lagt upp til.

Tað hevur verið sagt, at játtanin til Sjúkrahúsi í ár er 2 milliónir ov lítil til at varðveita sama støði í ár, sum í fjør.

Hetta hevði merkt, at 12-16 fólk máttu sigast upp. Og sostatt hevði tað verið neyðugt at lagt heilar funktiónir niður og tað var mett so mikið álvarsligt í Suðuroynni, at leiðslan vildi hava landsstýrið at gera av, hvørjar funktiónir skuldu halda uppat.

Men nú vísir tað seg, at støðan verður ikki so ring, sum upprunaliga mett.

Fyrst vísti tað seg, at ein roknifeilur í sambandi við lønarhækkingarnar gjørdi, at játtanin „bara“ verður 1,5 millión ov lítil til at varðveita sama støði í ár, sum í fjør, ístaðin fyri tvær milliónir, sum áður fráboðað.

– Samstundis ætla vit geva sjúkerahúsinum loyvi til at flyta 600.000-700.000 krónur frá sjálvum rakstrinum til lønir.

–Hetta gera vit fyri at sleppa undan at røra tær grundlegggjandi funktiónirnar.

Men hetta merkir so eisini, at nakrar sparingar mugu setast í verk. Eitt nú er ætlanin at spara í ambulantari fysioterapi, umframt á maskinverkstaðnum og í leiðbeiningini á sjúkrahúsinum.

– Alt hetta merkir, at sparingarnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi verða avmarkaðar til fýra-fimm størv, ístaðin fyri tey 12-16 størvini, sum tað upprunaliga varð talan um, sigur Helena Dam á Neystabø.

Og hon heldur, at tær sparingar, sum verða gjørdar, kunnu forsvarast.

**Fylgja tí upp**

Men landsstýrismaðurin leggur afturat, at hon fer ikki at sleppa Suðuroyar Sjúkrahúsi við hesum, men at hon fer at fylgja gongdini og at vita um tað ikki ber til at játta Suðuroyar Sjúkrahúsi meiri pening, sum frálíður, um talan eitt nú verður neyðugt at gera íløgur í onkur tól.

Men beint í løtuni duggur hon ikki at síggja, hvaðani hesin peningur skal koma, skoytir hon uppí.

Vit fingu ikki orðið á fyristøðumannin á Suðuroyar Sjúkrahúsi í gjár, tí hann var bundin allan dagin.

# Fáa ikki fleiri sjokkviðgerðir frá Helenu

*– Eg vil í hvussu so er ikki leggja navn til fleiri hendingar av hesum slagnum. So nú skal framtíðin hjá heilsuverkinum leggjast til rættis í góðari tíð, sigur Helena Dam á Neystabø*

Áki Bertholdsen



*Hetta lívið má halda uppat nú, tí eg vil ikki leggja navn til fleiri sjokkviðgerðir av hesum slagnum, sigur Helena Dam á Neystabø.*

– Hetta vil eg ikki leggja navn til longur. Tí skal virksemið leggjast betri til rættis hereftir.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna-og heilsumálum, sigur, at nú má tann tann afturvendandi sjokkviðgerðin, sum starvsfólkið á teimum trimum føroysku sjúkrahúsinum fáa hvørt einasta ár, halda uppat.

Hvørji einastu jól, síðani kreppan rakti, hevur starvsfólkið á teimum trimum sjúkrahúsunum bíða við bivandi hjarta eftir, hvat fór nú at henda. Tí hvørt ár hevur verið hótt við meiri og minni sparingum, skerjingum og hópuppsagnum - sum síðani aloftast eru tiknar aftur kortini, aftaná, at alt hevur verið á gosi í nakrar dagar, bæði starvsfólk, fakfeløg, leiðsla og politikarar.

Og í ár hendi tað aftur.

Kladdan til einar 20-27 uppsagnir á Landssjúkrahúsinum og einar 12-16 uppsagnir á Suðuroyar Sjúkrahúsi, var longu skrivað, tá ið avvarðandi landsstýrismaður einaferð enn mátti upp í leikin og fekk steðga tí ringasta óløginum, beint áðrenn tað breyt.

Og úrslitið var var aftur hesuferð, at tær allarflestu uppsagnirnar eru tiknar aftur.

– Tær sparingar, sum hóast alt verða gjørdar, eru í stóran mun sparingar, sum áttu at verið framdar kortini. Og summar av teimum kunnu avgreiðast við natúrligari frágongd.

Arbeitt verður nú víðari við hesum spariætlanunum. Men tær vera sjálvandi ikki settar í verk fyrrenn allar tær røttu manngagongdirnar eru fylgdar.

– Tað, at spara og at gera raksturin so bíligan sum gjørligt er eitt arbeiði, sum eigur at fara miðvíst fram hvønn einasta dag fyri at gera raksturin so bíligan sum gjørligt, tí endamálið má alla tíðina verða, at so nógv av peninginum sum gjørligt verður brúktur til tær tænastur, sum heilsuverkið skal veita borgarunum og ikki til meiri umsiting, enn tað er neyðugt at hava.

Og hvørki á Suðuroyar Sjúkrahúsi ella á Landssjúkrahúsinum verður talan um at skerja hvørki sjúkrarøktina, ella aðrar grundleggjandi funktiónir, sigur Helena Dam á Neystabø.

Tí sigur hon, at tað er ikki rætt, sum stóð í Sosialinum í gjár, at kreppan á Landssjúkrahúsinum er útsett og at spurningurin um fleiri sparingart skal takast uppaftur, táið nýggi røktarfakligi stjórin tekur við 1. apríl.

– Talan verður ikki um fleiri sparingar á røktarfakliga økinum, ella í øðrum grundleggjandi funktiónum, tí vit hava útvegað pening til, at tey virkisøkini kunnu halda fram óbroytt.

Hon sigur, at eitt nú hevði Landssjúkrahúsið eina umleggingarkonto uppá næstan eina millión.

– Eg kann ikki góðtaka, at peningur stendur á eini slíkari konto, samstundis sum fleiri fólk skulu sigast upp.

Helena Dam á Neystabø sigur, at hon er heldur ikki samd við leiðsluni á Landssjúkrahúsinum í, at tann nýggi leiðslubygnaðurin á landssjúkrahúsinum fer at kosta 1,6 millión í ár, tí hann fer ikki at virka í alt ár.

– Enn vita vit heldur ikki, hvørja støðu yvirlæknarnir taka til málið og røktarfakligi stjórin byrjar ikki í starvinum fyrrenn 1. apríl. Og at byggja eitt heilt hov av skrivarum rundanum tað nýggju leiðsluna, haldi eg er óneyðugt, tí tað eru skrivarar á Landssjúkrahúsinum frammanundan.

– Tilsamans er hetta nóg mikið til tær báðar smáu milliónirnar, sum skulu til fyri at sleppa undan sparingum á røktarfakliga økinum í ár.

**Ikki fleiri skelkir**

Men nú leggur Helena Dam á Neystabø eisini dýran við, at hetta lívið má halda uppat.

– Sjálvandi kunnu vit aftur koma í eina brádliga kreppu, sum ger tað neyðugt at taka heilt serlig stig. Men yvirhøvur skal starvsfólkið í heilsuverkinum ikki vænta sær fleiri sjokkviðgerðir av hesum slagnum, sum tey nú hava fingið hvørt tað einasta ár tað mesta av nítiárunum. Tí hendan framferðarháttin vil eg ikki leggja navn til longur.

Hon sigur, at tað nú verður neyðugt at fara undir eina langtíðar ætlan fyri, hvussu virksemið á sjúkrahúsunum skal vera framyvir.

– Tí havi eg longu nú álagt fyrisitingini á Landsjúkrahúsinum at fara undir fíggjarætlanina fyri 2001.

Og fyrrenn ætlanin hevur fingið politiska viðgerð, ber ikki til at siga, hvussu arbeiðið skal leggjast til rættis framyvir.

– Men skulu umleggingar og broytingar gerast, so er tað neyðugt at hava góða tíð til at fremja tær, so at ikki alt skal henda so brádliga, sum tað hevur verið hesi árini.

– Ein partur av hesum verður eisini at gera eina heildarætlan fyri heilsuverkið m.a. at gera av, hvørjar viðgerðir, vit skulu hava í Føroyum og hvørjar vit ikki skulu hava. Sjálvandi er sjúklingagrundarlagið til nógvar viðgerðir ov lítið til at vit kunnu hava tær í Føroyum. At leggja stór øki av aftur landinum verður ikki bíligari. Men tað fer hinvegin at gera tað minni áhugavert at arbeiða í føroyska heilsuverkinum.

*Eitt er at spara og at gera raksturin bíligari. Men tey, sum arbeiða á Landssjúkrahúsinum siga, at yvirhøvur er raksturin ov nógv skerdur og at hann eigur at vera einar 20 milliónir hægri um árið, fyri at tað skal bera til at reka sjúkrahúsið í eini tryggari legu?*

– Ja, vit kunnu ivaleyst verða samd um at Landssjúkrahúsið hevur ov lítið av peningi. Tí er tað, at vit fara undir eina langtíðar tilrættislegging nú, tí so kunnu vit stinga út í kortið, hvat vit vilja, og taka væl grundaðar avgerðir, so at avleiðingarnar verða væl gjøgnumhugsaðar, ístaðin fyri at fara fram óðum verkum hvørji einastu jól. Men akkurát, hvussu nógv Landssjúkrahúsið skal hava afturat, havi eg onga meining um nú. Sjálvandi kann tað altíð gerast betri, men tað er eisini sin spurningur, hvat vit hava ráð til.

*Men eitt, sum nógv fólk ikki skilja, er, hví heilsuverkið verður so nógv skert, samstundis sum fíggjarlógin hevur fleiri hundrað milliónir í yvirskoti?*

– Hatta er ein spurningur, sum tit eiga at seta fíggjarmálaráðharranum, tí vit hava eitt hart stríð í Landsstýrinum um hvussu teir fíggjarligu karmarnir skulu vera. Eg havi roynt at greitt frá, at so stórar lønarhækkingar, sum vórðu gjørdar í fjør, fáa avleiðingar fyri eitt øki, sum er so lønartungt, sum heilsuøkið er. Samstundis havi eg boðað frá, at eg eri sinnað til at spara og laga til, so nógv sum til ber. Men eg vil eisini hava mínir samgoingufelagar at skilja, at talan má vera um at gera tað yvir eitt ávíst áramál, sigur Helena Dam á Neystabø.



# Dygdarmenningarskipan í vinnuskúlunum góðkend

*Á fundi í farnu viku vóru karmarnir fyri dygdarmenningarskipanina í vinnuskúlunum endaliga góðkend, og nakrir av skúlunum eru komnir langt ávegis, at seta skipanina í verk*

Ólavur í Beiti

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum verður greitt frá um eitt prosjekt, ið hevur koyrt í gott tvey ár og sum hevur lagt lunnar undir hesi skipanina. Skúlarnir, ið hava luttikið, eru Sjómansskúlin, Maskinmeistaraskúlin, Tekniski skúlin og Handilsskúlin, og Undirvísingar- og Mentamálastýri hevur skipað arbeiðið, við hjálp frá einum donskum ráðgeva. Í verkætlanarleiðsluni hava umboð fyri vinnuna og fakfeløg luttikið.



**Komnir longst**

Sjómansskúlin og Maskinmeistaraskúlin eru teir, ið eru komnir longst við at seta skipaða dygdarmenning í verk. Hesir skúlar hava krøv uttanífrá um at hava eina góðskuskipan, um føroysku útbúgvingarnar skulu verða góðkendar internationalt.

– Góðskustýring er langt síðani vorðin partur av gerandisdegnum í vinnuni í grannalondunum, og hugtakið er eisini við at vinna fram í føroysku vinnuni, skrivar Vinnuhúsið. Føroysku fiskavirkini hava arbeitt við góðskustýring/innaneftirliti í fleiri ár, men sum heild er okkara vinna aftanfyri grannalondini á hesum øki. Nú oljuvinnan stendur fyri durum, er góðskustýring eitt treytaleyst krav til komandi veitarar. Tí fegnast vit um, at skúlaverkið gongur undan á hesum økinum. Og sjálvt um verkætlanin hevur gingið heldur spakuliga, trúgva vit, at hon kann gera mun, verður sagt frá Vinnuhúsinum.

# Starvsvenjing hjá maskinatstøðingunum

Reglur fyri eini starvsvenjingarskipan fyri maskinatstøðingar eru nú lidnar. Útbúgvingarráðið fyri maskinmeistaraútbúgvingar hevur arbeitt við málinum

Reglurnar byggja á avtaluna millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið fyri fiskiskip, har partarnir hava bundið seg til at taka sær av 18 mánaða starvsvenjingini hjá maskinatstøðingunum. Reglurnar seta krøv til maskinmeistaran, praktikkantin og til reiðaríið/sjóvinnufyrisitingina.

Fyri at tryggja, at atstøðingarnir fáa neyðuga frálæru og venjing, er neyðugt, at maskinmeistarin hevur minst 2 ára útbúgving. Tó kann ein maskinnistur hava frálæruna um hendi fyrstu 6 mánaðirnir av starvsvenjingartíðini.

Krøv til praktikkantin er millum annað, at tann ástøðiligi parturin skal vera liðugur, tvs. tilsamans 2 ár. Kjakast varð um, um atstøðingurin skal mynstra sum ófulltikin við tað, at hetta er avtalað millum Reiðarafelagið fyri fiskiskip og Maskinmeistarafelagið. Útbúgvingarráðið hevur tað fatan, at atstøðingurin kann mynstra sum 3. meistari, um hann bara gongur dagvakt.

Skipasløg, sum kunnu taka atstøðingar, eru flakatrolarar, rækjutrolarar, djúpvatnstrolarar, farmaskip, ferðamannaskip og pelagisk skip (nótabátar). Ein nevnd við fakligum kunnleika skal góðkenna, um skipini lúka krøvini sum starvsvenjingarpláss. Nevndin skal somuleiðis góðkenna útbúgvingarhandbókina hjá tí einstaka nemingini.

Nevndin, sum verður ein nevnd undir Útbúgvingarráðnum, arbeiðir víðari við málinum, og fer at hava ein temadag, har kunnað verður nærri um skipanina, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi.

# Magni Laksáfoss um føroyska búskapin

Mikukvøldið komandi **heldur Magni Laksáfoss fyrilestur á Fiskirannsóknarstovuni, ið hann kallar: »*Stutttíðarbúskaparmyndlar yvirhøvur og um EMFI. Hvat kann hann nýtast til og hvussu?*«**

Hetta er fjórði fyrilestur í røðini við evnum m.a. úr Hvítubók.

Magni Laksáfoss er búskaparfrøðingur og starvast sum fulltrúi á Hagstovu Føroya. Saman við einum øðrum lesandi gjørdi hann sum høvuðsuppgávu á Københavns Universitet ein búskaparmyndil um føroyska búskapin (EMFI).

Myndilin hevur verið nýttur í sambandi við Hvítubók, har nógvar útrokningar vóru gjørdar í myndlinum fyri at lýsa avleiðingarnar av at minka um ríkisveitingina.

Í fyrilestrinum verður fyrst ein gjøgnumgongd av, hvat ein búskaparmyndul er, og hvussu búskaparmyndlar verða nýttir í arbeiðnum hjá búskaparfrøðingum. Dømi verða tikin um, hvussu myndlar vórðu nýttir, tá Hvítabók varð skrivað. Síðan er ein gjøgnumgongd av, hvussu búskaparmyndlar verða bygdir. Fleiri sløg av búskaparmyndlum eru til, men her verður serliga tosað um teir myndlarnar, sum vórðu nýttir í Hvítubók. Dømi verður tikið um, hvussu EMFI bleiv bygdur.

At enda verður eitt meira filosofiskt tjak um, hvussu myndlar í øðrum londum hava broytt tað fakliga tjakið um búskapin, og um hvønn leiklut myndlar hava í øðrum londum í dag.

Annars vísir Fróðskaparsetur Føroya og Fróðskaparfelagið til heimasíðuna www.sleipnir.fo/setur/tiltoek.

# Foreldrini fáa fløgu

*Føroya Sparikassi fer nú eisini at lata nýggjum foreldrum eina fløgu*



Tá børn koma til verðina á Suðuroyar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsi letur Føroya Sparikassi foreldur teimum ein gávukekk til at stova eina konto. Við í hesi vøggugávu hevur eisini verið ein bók, og framyvir fáa foreldrini eisini eina fløgu til gávus. 3‘arin gevur fløguna út.

Tað er ein nýggj fløga við tveimum barnasangum, sum Føroya Sparikassi nú fer at lata foreldrunum.

Beinta Zachariassen stendur fyri fløguni, og afturat sær hevur hon haft bæði føroyskar og danskar tónleikarar. Sangirnir eru upptiknir í Århus.

Yrkingina til sangin Lítla barn hevur Annfinnur Zachariassen gjørt, og lagið hevur Maria Guttesen gjørt. Maria Guttesen hevur eisini skrivað lagið til sangin Mítt barn, sum Jóhanna Christoffersen hevur gjørt yrkingina til.

Beinta Zachariassen syngur sangirnar, og saman við henni syngja eisini børnini Elinbjørg Ólavsdóttir Rasmussen og Bárður Rúnason.


